John er ivasamur til landsdystirnar

Fótbóltslandslið okkara tykist at hava ætlanir um at tryggja framtíðina hjá føroyskum fótbólti, og møguliga merkir hetta, at John Petersen ikki verður tøkur til komandi landsliðsuppgávurnar

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Í dag, týsdagin, eru bert átta dagar eftir, til A-landsliðið í fótbólti skal á fyrstu veruligu landsliðsferðina, har leiðin gongur til ávíkavist Luksemburg og Russlands.

Enn er hópurin ikki úttikin, men fyri flestu fótbóltsáhugaðar føroyingar man lítil ivi vera um, at John Petersen fer at teljast millum teir, sum Allan Simonsen setur álit sítt á.

Avboð hóttir

Sjálvur er John tó ikki so vísur í, at hann verður við á ferðini hjá landsliðnum. Unnusta hansara, Arnbjørg Danielsen, er komin væl áleiðis í royndunum at økja um húskið. Somikið væl áleiðis, at hon møguliga skal eiga, meðan landsliðsleikararnir eru staddir uttanlands.

Spurdur, um hetta kann ávirka luttøku hansara til komandi landsdystirnar, sigur John Petersen, at tað er væl møguligt.

– Nú er landsliðið ikki úttikið enn, so lat okkum fyrst síggja, um eg teljist millum leikararnar í hópinum, sigur hann, hóast tað ikki munnu vera mong, sum ivast í hesum.

– Enn havi eg so onga endaliga støðu tikið, men um so er, at eg verði úttikin, og Arnbjørg ikki hevur átt, áðrenn fráferðina, so verður allar helst talan um eitt avboð, sigur hann víðari.

– Enn fái eg tó sjálvandi ikki sagt nakað endaligt um hetta. Hon er sett at eiga 18., og heldur hetta, so er sum so ikki nakar trupulleiki. Møguleiki er eisini fyri, at eg kanska kann spæla seinna dystin, men tað er so havi fingið boðið, ella sum eg havi tosað við nakran um, sigur John Petersen at enda.

Baby boom

Líka mikið nær familjuvíðkanin hjá John Petersen fer í gongd, so er eftir øllum at døma líkt til, at landsliðsleikarar okkara royna at økja um fólkatalið her á landi.

Fyri stuttum eru bæði Jóhannis Joensen og Arnbjørn Danielsen vorðnir pápar at hvør sínari dóttir, og innan langa tíð fer Øssur Hansen eisini at teljast millum landsliðsleikararnar, sum millum annað hava blæðuskift á skránni.

Til stuttleikar kann annars nevnast at enda, at tað ikki bert er Allan Simonsen, sum verður nervaður av hesum lítla baby-boom'-inum. Arnbjørg Danielsen hevði uttan iva verið eitt av mest uppløgdu evnunum til kvinnulandsliðið, um hon var tøk til komandi uppgávurnar, men fyri fyrst noyðist Álvur Hansen í øllum førum at klára seg uttan hennara hjálp.

Máltindurin:

Ioana Rapa	VÍF	157	(36)
Simona Dziugyte	Stjørnan	135	(28)
Regina Radó	VB	123	(33)
Sóley Mikkelsen	VÍF	119	(40)
Annika Thomsen	Neistin	116	(21)
Andrea Lütz	VB	100	(9)
Lotte Sørensen	Kyndil	100	(47)
Vesna Tomajek	Stjørnan	96	(27)
Jórun Ludvig	Kyndil	92	(14)
Nicolina Eyðbjørnsdóttir	VÍF	91	
Anna K. Samson	Stjørnan	91	(1)
Fríða Marjunardóttir	VÍF	90	(9)
Gurið Mortensen	VB	87	(5)
Beinta Joensen	Tjaldur	72	(12)
Nicoleta Radu	VÍF	65	

Máltindurin:

Halgir D. Olesen	H71	180	(36)
Bjarni Wardum	Kyndil	149	(43)
Sverri Justinussen	Tjaldur	119	(16)
Dorica Tomic	KÍF	119	(30)
Ingi Olsen	VÍF	114	(30)
Artur Johansen	StÍF	111	(39)
Áki Olsen	VÍF	103	(8)
Sámal Joensen	VÍF	102	(9)
Jónleif Sólsker	Kyndil	93	(23)
Martin Hummeland	VÍF	88	
Costin Dumitrescu	StÍF	87	(20)
Mortan Hansen	Tjaldur	74	(3)
Kári Mortensen	Neistin	72	(16)
Áki Mørk	Neistin	71	(6)
Jacob Jónsson	Neistin	71	(6)

Støðan 1. deild kvinnur

	ystir	*v*				*t*	*vunnin*	*tapt*	*unur*	*stig*
1. VÍF	8	8	-	0	-	0	606	321	285	28
2. Stjørnan	7	5	-	0	-	2	521	398	123	20
3. VB	7	5	-	0	-	2	508	389	119	19
4. Neistin	6	4	-	0	-	2	393	387	6	13
5. Kyndil	7	1	-	1	-	5	442	536	-94	8
6 .Tjaldur	7	1	-	1	-	5	290	491	-201	4
7. Sóljan	8	0	-	0	-	8	318	556	-238	2

Støðan 1. deild menn

	ystir	*v*				*t*	*vunnin*	*tapt*	*unur*	*stig*
1. VÍF	7	7	-	0	-	0	619	454	165	26
2. StÍF	7	4	-	1	-	2	549	492	57	17
3. Kyndil	7	4	-	1	-	2	534	483	51	17
4. Neistin	7	4	-	0	-	3	461	481	-20	14
5. KÍF	7	3	-	1	-	3	457	505	-48	10
6. H71	8	1	-	0	-	7	508	580	-72	6
7. Tjaldur	7	0	-	1	-	6	440	573	-133	4

Michael lærdi fólk at rocka

orki as uss n

Fríggjakvøldið 9 mars var tað stóra tiltakið við Michael Learns To Rock í høllini á Hálsi. Góður hýrur var í fólki og tónleikarum, ið leiktu framúrskarandi góðan pop-rock tónleik. Tiltakið byrjaði klokkan átta og endaði klokkan hálvgun ellivu. Kendi danski bólkurin hevur verið her á klettunum einaferð fyrr, men sjálvur hildu teir, at henda ferðin varð betri enn seinast.

HR Booking við Rúna Persson á odda, stóð fyri tí stóra tiltakinum, sum var á Hálsi. Øll fjøðin var meir ella minni sera nøgd við konsertina, og ikki minst tónleikarnir.

Á pallinum var sera heitt, tí við 42 ljóskastarum uppá samanlagt 30.000 watt og 20 hátalarar uppá samanlagt 25.000 watt, skuldi tað veri nokk av hita, ljósi og ikki minst av ljóði.

Sosialurin fekk eitt prát við sangaran og ljómborðsleikarin Jascha Ritcher.

an i ørø rn

Ja, helt sikkert, fordi Færøerne har et smukt landskab, og folk er meget intereseret i de ting man laver.

vor ang gang ar v r t r

Vi har været her en gang før, og det var i august måned '96.

va syn s o t f røsk fo k

De er meget flinke og rare, og man føler en vis tryghed at være her oppe.

vorn r start og vorn r fik su s

Vi startede i '88, men begyndte ikke at få succes før i '92.

va r r s fr ti s p an r

Vi skal på onsdag til Schweits, og så nogle dage bagefter skal vi til Finland. Så har vi også planer om at turnere i Asien, og så til sidst skal vi spille meget i Danmark.

ar p an r o at ko ti bag ti rø rn

Ja, fordi vi skal en gang i tiden lave en Færø, Island, Grønland tour.

v r r s inspirati onski

Øøh, jo, vi er meget inspirerede af Supertramp, The Bee Gees og Abba.

an i t f røsk usik iv

Vi kender desværre ikke meget til det, så det er svært at sige.

an i n f røsk ku tur

Hvis du mener maden, så siger vi, at vi ikke har smagt noget af det, men I har en god Olaifest.

Tónleikurin

Sigast kann, at hetta var ein av teimum stóru tiltøkunum, ið hava verið í longri tíð í Havnini, og hetta hevur verið við til at seta rættuliga gongd í tónleikalívið her á oyggjunum. Fyri bert fáum vikum síðani var heimskendi technotónleikarin DJ Aligator her heima, og so er tað eisini Prix Føroyar, ið hevur stóra ávirkan fyri menningina í føroyska tónleikinum.

Michael Learns To Rock vórðu mannaðir av fýra tónleikarum, og teir vóru Jascha Ritcher sang og ljómborð, Kåre Wancher trummur, Mikkel Lentz gittar og Henrik Schou Poulsen, ið bert spælir við á konsertum, og hann spælir bass í bólkinum. Bólkurin hevði eisini ein back-gear teknikara, ein monitor teknikara, ið bólkurin hevur heitið eftir, tí hesin monitor teknikarin eitur nevniliga Michael, og til síðst høvdu ein front teknikara (front of house.)

Okkara egni Ronny Petersen, ið var ljósmaður á Prix Føroyar í Klaksvík og Miðvági var eisini ljósmaður fríggjakvøldið.

Konsertin

Nógv spurd fólk hildu, at atgongumerkini vóru ov, og ætlaðu sær ikki til konsertina á Hálsi. Hóast tey spurdu ikki komu, vóru tó sera nógv fólk møtt upp.

Vanligt er á konsertum á Hálsi, at tey tilkomnu sita á áskoðaraplássunum, og tey ungu streyma fram móti pallinum, og hesa ferðina varð ikki øðrvísi. Konsertin byrjaði tjúgu minuttir ov seint, tí sum flest vita, so eru føroyingar altíð ein góðan hálvan tíma ov seinir uppá tað. Hetta var ikki júst eitt drukktiltak, fyri tað um onkur hevði ein lítlan uppi á sær, hetta var meiri eitt upplivingartiltak.

Michael Learns To Rock spældi ikki hesuferð playback, sum sagt varð at teir gjørdu seinast. Fólkið tók sera væl ímóti danska rockpop bólkinum, so væl at eldri fólk høvdu kunna spurt, um tey ungu ikki fáa ilt í lógvarnar, tí nógv varð gjørt av skríggjan og klappan, tá ið bólkurin leikti tey kendu løgini hjá sær, s.s. Breakin' My Heart og Someday, ið varð leiktur triðsíðst, tí tá ið bólkurin fór av palli, varð skrála eftir tveimum løgum, og langt um leingi varð tað so gjørt.

Sangarin dugdi sera væl at føra seg fram, og bólkurin var væl samanspældur á palli. Í tí vakra grøn-bláa ljósinum, meðan tey heldur penu stillu løgini vórðu leikt, og tendrarnir hægstir, líktiskt høllin einari ungarnskari kirkju.

Klokkan 21.00 hevði bólkurin eina pausu uppá góðan hálvan tíma, og í pausuni varð leiktur góður tónleikur frá m.a. Eric Clapton, Cher, Britney Spears o.ø. Allar T-shirtirnar vórðu seldar, og aftaná konsertina bar eisini til at fáa undirskriftir frá bólkinum.

Michael Lears To Rock spældi eisini nýggjan tónleik, ið var frá nýggju fløgu teirra, ið eitur Blue Night, og eitt av løgunum hevði tað sama heitið sum fløgan. Aftaná lagið segði Jascha Ritcher, at ørsøkin til at teir so seint komu aftur til Føroyar var, at kvinnurnar her á landi vóru ov villar, og beint aftaná tey orðini, leiktu teir ein ótrúliga gott lag, sum vísti at Michael veruliga hevur lært at rocka. Sangurin æt Wild Women.

Í niðurløgunum sloppu áhoyrarnir at syngja, tað sum í restaði. Sølukonurnar aftanfyri diskin, har ið sodavatn kundi keypast, stóðu eisini heilt villar og dansaðu til tónleikin.

Tónleikarnir vóru sera væl nøgdir við tiltakið aftaná konsertina, ið endaði klokkan 22.30.